## Liðug við makrelin

Tey fýra nótaskipini í Gøru eru nú liðug at fiska makrelkvotuna. Saksaberg var liðugur fyri einari viku síðani, og Finnur Fríði og Jupiter vóru lidnir í síðstu viku. Tróndur í Gøtu var í gjár í Noregi og landaði tey seinastu 240 tonsini. Ta fyrstu tíðina fingu skipini góðar seks krónur fyri makrelin, men í seinastuni hevur prísurin ligið um níggju krónur. Finnur Fríði og Jupiter eru nú á sild norðanfyri, og Saksaberg er í Norðsjónum.

## Norðurlond fyrimynd

Í mong ár hava onnur lond hugt við langtandi eygum at teirri norðurlendsku vælferðarskipanini, og nú eru tað fransmenn, sum venda eygunum hendanvegin. Á einari ráðstevnu í Svøríki í síðstu viku kom fram, at franskir politikarar hava verið í Svøríki og øðrum Norðurlondum og kannað vælferðarskipanina við tí fyri eyga at brúka hana sum fyrimynd. Sum skilst kunnu fransmenn brúka fleiri partar av skipanini.

# Globalisering í uttanlandshandli

**Hóast globaliseringin dagliga er á breddanum, vísa tøl frá Hagstovuni, at vit snøgt sagt innflyta vørurnar úr somu londum, sum vit gjørdu fyri 10 árum síðan. Lítil broyting er í úrvalinum av samhandilslondum - bæði í innflutningi og útflutningi.**

SAMFELAG

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sambært Hagstovuni, høvdu tey væntað at sæð globaliseringina aftur í handilssamskiftinum landanna millum, av tí, at tað skal vera lættari at fáa atgongd til marknaðirnar hvør hjá øðrum. Ein brúkari í Danmark skuldi havt betri atgongd til ta vøruna við akkurát tí góðsku og tí prísi hann ynskir sær, uttan mun til í hvørjum landi vøran finst.

Men vøruhandilin tykist ikki vera so ógvuliga nógv broyttur – hjá okkum í hvussu er – hóast onkur áhugaverd rák eru at hóma.

Føroyar hava, í mun til nógv onnur lond, sera umfatandi vøruhandil við umheimin. Ikki so løgið kanska, tí landið er so lítið. Men tey lond, vit hava handilsviðskifti við, tykjast vera tey somu, sum vit hava samskift við í nógv ár.

Í 1995 innfluttu vit 72 prosent av øllum vørum úr fimm grannalondum, mett í innflutningsvirði uttan skip. Tíggju ár seinni, í 2005, innfluttu vit 71 prosent frá somu fimm londum.

Hetta bendir ikki á, at vit hava gjørt okkum dælt av einum frælsari handilsheimi, tí tá høvdu vit væntað at leitað varð til nýggjar marknaðir.

Onkur tekin eru kortini um, at broytingar hava verið í handlinum hesi seinastu 10 árini, men broytingin vikar ikki ta sannroynd, at vit framvegis innflyta meginpartin av vørunum úr somu fimm londunum.

Eitt nú er innflutningurin úr so fjarum londum sum Teivan, Kina, Argentina, Suðurkorea og Turkalandi vaxin eitt sindur, hóast talan ikki er um so stóran vøxtur í krónum og oyrum. Innflutningurin úr europeiskum grannalondum sum Bretlandi, Danmark og Niðurlondum er harafturímóti lutfalsliga minni, enn hann var fyri 10 árum síðan.

At farmaleiðirnar hjá einum so lítlum oyggjasamfelag hava týdning, er lítil ivi um. At siglingin upp á Bretland helt uppat, hevur sjálvsagt ávirkan á handilin. Men hendan uppgerðin tekur støði í upprunan á vøruni - ikki hvaðani hon verður flutt - og tí skuldi farmaleiðin havt eitt sindur minni týdning.

| | 1995 | 2005 |
|---|---|---|
| **Danmørk** | 607 | 1.195 |
| **Noreg** | 278 | 768 |
| **Bretland** | 142 | 211 |
| **Týskland** | 139 | 297 |
| **Svøríki** | 102 | 239 |
| **Samanlagt 5 lond** | 1.268 | 2.709 |
| **Í prosentum** | 71,30% | 72,20% |
| **Allur vøruhandil uttan skip** | 1.778 | 3.754 |

*Innflutningur 1995 og 2005, landaskiftur í miljónum*

| | 1995 | 2005 |
|---|---|---|
| **Bretland** | 520 | 1.012 |
| **Danmark** | 448 | 516 |
| **Týskland** | 196 | 183 |
| **Frakland** | 168 | 295 |
| **Italia** | 102 | 99 |
| **Noreg** | 99 | 207 |
| **Spania** | 98 | 349 |
| **Japan** | 77 | 126 |
| **Samanlagt 5 lond** | 1.707 | 2.787 |
| **Í prosentum** | 86% | 82% |
| **Allur vøruhandil uttan skip** | 1.992 | 3.391 |

*Útflutningur 1995 og 2005, landaskiftur í miljónum*

Vit keypa ikki bara vørur úr somu londum sum fyri tíggju árum síðani. Tølini vísa eisini, at vit í 2005 seldu 82 prosent av útflutningsvirðinum til somu átta lond, sum vit seldu 86 prosent av útflutninginum til í 1995. Skip eru ikki íroknað.

At vit selja somu londum fiskin sum fyri tíggju árum síðan, er kanska ikki so løgið, tí vøruúrvalið er rættuliga einstáttað. Innflutningurin er harímóti meira fjøltáttaður í vøruúrvali, góðsku og prísi. Av tí orsøk høvdu vit væntað, at meira umfatandi broytingar vóru í skaranum av londum, sum vit keypa vørurnar frá.

# Koppseting móti krabbameini nærkast

**Læknar í Danmark kunnu nú bjóða gentum og kvinnum í aldrinum 9 til 26 ár at verða koppsettar móti lívmóðurhálskrabba, um tær sjálvar gjalda fyri koppingarevnið.**

HEILSA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Týsdagurin var ein søguligur dagur í Danmark, tí henda dagin kom eitt nýtt slóðbrótandi koppingarevni á danska marknaðin. Eitt koppingarevni, sum kann bjarga nógvum mannalívum og sum kann fyribyrgja umleið 70 prosentum av tilburðunum av krabbameini í lívmóðurhálsinum. Læknar í Danmark kunnu nú bjóða gentum og kvinnum í aldrinum 9 til 26 ár at verða koppsett móti lívmóðurhálskrabba, um tær sjálvar gjalda fyri koppingarevnið.

### Eisini í Føroyum

Stendur tað til landslæknan í Føroyum og Føroya Felag móti Krabbameini verður hetta tilboðið eisini í Føroyum. Høgni Debes Joensen, landslækni, hevur sagt, at hann fer at mæla til, at ein koppsetingarskrá, ið eisini fevnir um lívmóðurhalskrabba, verður sett í gildi í Føroyum, helst samstundis sum í Danmark.

Jansy Gaardlykke, ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur hjá Føroya Felag móti Krabbameini, fegnast um útlitini til, at farið verður undir at koppseta móti lívmóðurhálskrabba.

– Føroya Felag móti Krabbameini er í prinsippinum fyri øllum, sum kann vera við til at fyribyrgja krabbamein. Tí heilsar felagið einum slíkum tiltaki vælkomið. Hetta er eitt gjøgnumbrot í krabbameinssøguni, sigur hon.

### Rakar 18 kvinnur árliga

Krabbamein í lívmóðurhálsinum rakar á hvørjum ári 18 kvinnur í Føroyum, í Danmark er talið 400 kvinnur. Vit vita, at helmingurin av kvinnunum doyggja. Koppingarevnið verjir móti einum krabbaelvandi virusi, sum smittar við kynsligum sambandi. Orsøkin er ígerð av Human Papilloma Virus ella HPV. Nýggja koppsetingin fyribyrgir, at gentan ella kvinnan fær tvey sløg av HPV (16 og 18). Tað vil siga, at taka gentur og kvinnur av tilboðnum áðrenn tær eru kynsliga búnar, kunnu vit sleppa undan 70 prosent av tilburðunum. Danska



heilsumálaráðið viðger nú, at um henda koppsetingin skal verða partur av koppsetingartilboðnum, sum flestu børn taka av. Verður hon tað, fáa allar gentur í aldrinum 11 til 12 ár ókeypis hesa koppsetingina. Til tá skal hvør einstøk gjalda sjálv – hon kostar 1155,50 kr. hvørja ferð og genturnar skulu koppsetast tríggjar ferðir.